## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi, seinnapartin upp í andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 14 og 17 stig, men har mjørki legst um 11 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, seinnapartin upp í hvassan vind. Yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og landnyrðingi og regn av og á. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

*Juni var bæði turrur í lýggjur. Avfallið var bert 17mm ímóti 66mm, sum er miðal yvir 30 ár. Miðalhitin var 9,9°c ímóti 9.0°c yvir 30 ár.*

# Gera ábøtur á grótkastið

**Tað fóru eini 100-150 kubikk av ytru síðuni á sunnara grótkastinum í Nólsoy í vetur, og tað verður lagt í aftur nú**

ÁBØTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Veturin var heldur baldrutur, í hvussu er í støðum, og nógvi uppgangurin gekk eisini út yvir sunara grótkastið á havnini í Nólsoy.

- Tað skolaði eitt stað millum 100 og 150 kubikk burtur av ytru síðuni á sunnara grótkastinum, og tað er tað, sum nú verður lagt í aftur, sigur Arnbjørn Kristiansen av havnaskrivstovuni.

Grótbáturin Siri hjá J&K Petersen kom stutt fyri klokkan 17 týsdagin til Nólsoyar, fullur av stórum gróti, og við stóra flakanum hangandi í sær.

- Ein gravkúgv við einum serligum grabba stendur á flakanum og leggur grótið, sum verður tikið úr lastini á grótbátinum, sigur Arnbjørn Kristiansen.

Skaðin er hendur á nýggja partinum av grótkastinum, beint innanvert betongkistuna á endanum á grótkastinum.

Umvælingin av grótkastinum byrjaði í gjár og tekur bara nakrar fáar dagar.



*Gtótbáturin Siri hjá J & K Petersen kom saman við flakanum til Nólsoyar týsdagin*

*Mynd: Leo Poulsen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 30 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt lagtrýst,1010 hPa. skamt í útsynning úr Føroyum grynnist. Eitt hátrýst, 1033 hPa. yvir Grønlandi stendur í stað og viknar nakað.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum grynnist framvegis. Lágtrýstið yvir Ermasundi fer spakuliga í landnyrðing.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/07 kl. 06[00] – 07/07 06[00]. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í juli: +0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 06/07 kl. 06[00] – 07/07 06[00].
Avfallið higartil í juli: 2 mm




Javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

7. juli — Mánin longst frá jørini
15. juli — Seinna kvarter
21. juli — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 16. juli | 01:47 | 14:22 | 00:47 | 13:22 | 01:02 | 13:37 | 03:47 | 16:22 | 04:47 | 17:22 | 00:02 | 12:37 | 11:37 | - | 02:02 | 14:37 | 03:02 | 15:37 | 01:32 | 14:07 | 02:47 | 15:22 |
| 17. juli | 02:46 | 15:11 | 01:46 | 14:11 | 02:01 | 14:26 | 04:46 | 17:11 | 05:46 | 18:11 | 01:01 | 13:26 | 00:01 | 12:26 | 03:01 | 15:26 | 04:01 | 16:26 | 02:31 | 14:56 | 03:46 | 16:11 |
| 18. juli | 03:38 | 16:05 | 02:38 | 15:05 | 02:53 | 15:20 | 05:38 | 18:05 | 06:38 | 19:05 | 01:53 | 14:20 | 00:53 | 13:20 | 03:53 | 16:20 | 04:53 | 17:20 | 03:23 | 15:50 | 04:38 | 17:05 |
| 19. juli | 04:34 | 17:03 | 03:34 | 16:03 | 03:49 | 16:18 | 06:34 | 19:03 | 07:34 | 20:03 | 02:49 | 15:18 | 01:49 | 14:18 | 04:49 | 17:18 | 05:49 | 18:18 | 04:19 | 16:48 | 05:34 | 18:03 |
| 20. juli | 05:33 | 18:03 | 04:33 | 17:03 | 04:48 | 17:18 | 07:33 | 20:03 | 08:33 | 21:03 | 03:48 | 16:18 | 02:48 | 15:18 | 05:48 | 18:18 | 06:48 | 19:18 | 05:18 | 17:48 | 06:33 | 19:03 |